## Pytlick aftur landsliðsvenjari

Fyri eini tíð síðani segði venjarin hjá danska kvinnulandsliðnum í hondbólti seg úr starvi, tí fleiri av leikarunum vóru ónøgdar við gongdina og hansara avgerðir. Jan Pytlick, sum hevur vant kvinnurnar fyrr, tók fyribils yvir á landsliðnum, men nú er greitt, at Pytlick heldur fram í føstum starvi hjá danska hondbóltssambandinum sum venjari hjá kvinnulandsliðnum. Pytlick hevur verið venjari hjá GOG/Svendborg TGI, har hann hevur vant besta kvinnuliðið. Hann fer beinanvegin í starv, sum nýggjur danskur landsliðsvenjari.



## Romari fekk mál nummar 999

41 ára gamli brasiliumaðurin, Romario, hevur leingi roynt at nátt tey 1000 málini, sum hann hevur sett sær fyri at skora. Í gjár tók hann enn eitt stórt fet ímóti teimum 1000 málunum, tá hann skoraði eitt mál í 3-0 sigrinum hjá Vasco Da Gama ímóti erkafíggindunum úr Flamengo. Við málinum er Romario nú komin uppá 999 mál. – Tíverri fekk eg bara eitt mál í dystinum, so nú verið eg noyddur at bíða til næsta dyst, segði Romario eftir dystin.

# Góð úrslit í Melbourne

**Úrslitini hjá føroyingunum hava verið góð í HM í Melbourne, og m.a. hevur Pál Joensen úr Vágs Svimjifelag sett nýtt føroyskt met á teininum 400 m frí**

SVIMJING
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



Í hesum døgum eru fýra føroyskir svimjarar í Melbourne í Avstralia, har teir taka lut í HM-kappingini í svimjing. Teir fýra føroyingarnir eru Pál Joensen úr Vágs Svimjifelag, Mona Simonsen og Jutta Thomsen úr Tvøroyar Svimjifelag og Kristian Olsen úr Ægir. Landsliðsvenjarin, Jón Bjarnason, og Palli Ziskason, formaður í Svimjisambandinum, eru eisini við í ferðalagnum.

Tríggir av teimum føroysku svimjarunum hava longu verið í onkrari kapping, og úrslitini hava verið avbera góð.

### Pál setti nýtt met

Sunnunáttina skuldu føroyingarnir so í hylin fyri fyrstu ferð í kappingini, og tann fyrsti, sum slapp framat, var Pál Joensen úr Vágs svimjifelag, sum skuldi royna seg í 400 m frí.

Pál svam í triðja riðli, og hann legði seg á odda mest sum alt fyri eitt. Hesa leiðslu helt hann at kalla allan vegin, men tá svimjararnir vendu fyri seinastu ferð, hevði ein av hinum svimjarunum lagt seg eitt vet fram um Pál. Pál var tó nógv sterkari í endaspurtinum og vann eisini trygt.

Tíðin hjá unga vágbinginum var somikið góð, at hann setti nýtt føroyskt met, og samanlagt endaði hann á einum 52. plássi av fleiri enn 70 svimjarum.

Seinni sunnunáttina vóru eisini Mona Simonsen og Jutta Thomsen í hylinum. Tær skuldu eisini luttaka í 400 m frí. Tær báðar tvøragenturnar vóru endaðar í sama riðli, og her gjørdu tær veruliga bart. Mona vann teirra riðil, og á øðrum plássi kom Jutta á mál. Samanlagt endaðu tær á ávikavist 46. og 49. plássi av 66 luttakarum.

Í nátt, mánanáttina, luttøk Pál Joensen í kappingini 200 m frí. Her endaði hann á einum fjórða plássi í riðli 5 við tíðini 1.59.82. Við hesi tíðini endaði hann á einum 86. plássi av 199 luttakarum.

### Skal royna seg ímóti Hatchett

Komandi nátt fær Pál Joensen harða kapping, tá hann skal royna seg á 800 metrum. Her er hann endaður í riðli tvey, og ein av hansara mótstøðumonnum verður amerikumaðurin, Grant Hatchett, sum eigur heimsmetið á hesum teininum. Hetta setti hann í Avstralia fyri tveimum árum síðani.

Á seinastu olympisku leikunum royndi Grant Hatchett at sláa legendariska metið hjá Mark Spitz fyri mest vunnin gullheiðursmerki á einari olympiadu. Mark Spitz vann heili sjey gullheiðursmerki á Olympiaduni í München í 1972, og undan seinastu olympiaduni boðaði Hatchett frá, at hann ætlaði at sláa metið. Hatchett gjørdist tó ov stuttur, men einki er at ivast í, at hann er millum heimsins sterkastu svimjarar.

### Hevur gingið væl

Palli Ziskason, formaður í svimjisambandinum, er við ferðalagnum í Melbourne, og hann var ótrúliga bergtikin av sjálvum tiltakinum. Í samrøðu við útvarpið í gjár segði hann eisini, at teir vóru væl nøgdir við føroysku svimjararnar.

- Eg haldi, at okkara svimjarar hava klárað tað betri enn væntað. Her eru 14.000 áskoðarar hvønn dag, og hetta er ein stór roynd hjá svimjarunum. Man kundi hugsað, at teir nervaðust av stóru fjøldini, men tað eru teir slett ikki. Teir hava klárað tað fram úr.

- Annars kann sigast, at hetta er eitt stórsligið tiltak, og umstøðurnar eru heilt ótrúliga góðar, segði Palli Ziskason við útvarpið í gjárkvøldið.

### Hesi eru klár til Oyggjaleikirnar

Elspa Mørkøre
Kristian Olsen
Pál Joensen
Jutta Thomsen
Karina Petersen
Beinir Danielsen
Jákup Øssurson
Karí á Høvdanum
Pauli Mohr
Shaila millum
Garðarnar
Dánjal Martin Hofgaard
Mona Simonsen
Høgni Miné Rasmussen
Bjørg Seloy

# Svimjilandsliðið á venjingarlegu

**Svimjilandsliðið hevur verið á venjingarlegu í Klaksvík um vikuskiftið, og Kristian M. Joensen hjálparvenjari er væl nøgdur. – Tað gongur støðugt fram á hjá svimjarunum, so eg eri vælnøgdur**

SVIMJING
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið hevur svimjilandsliðið verið á venjingarlegu í Klaksvík. Allir svimjararnir í landinum vóru tó ikki við til venjingarnar, tí svimjararnir úr Suðuroy vóru ikki við. Harafturat vóru teir fýra svimjararnir, sum í løtuni taka lut í HM í Melbourne, av góðum orsøkum ikki við til venjingarnar.

Vit hava tikið eitt prát við hjálparvenjaran á landsliðnum, Kristian Martin Joensen, sum er vælnøgdur við gongdina hjá svimjarunum.

### Gongur støðugt fram á

15 svimjarar vóru við á venjingarleguni í Klaksvík um vikuskiftið, og Kristian Martin er sum heild væl nøgdur við støðið hjá svimjarunum.

- Ja, eg eri rættiliga væl nøgdur. Svimjararnir eru væl fyri, og tað gongur støðugt fram á alla tíðina.

Kristian Martin heldur eisini, at støðið á føroyskari svimjing er hækkandi.

- Eg haldi, at tað gongur rætta vegin hjá føroyskari svimjing. Tíðirnar blíva betri og betri, so tað sær gott út. Fleiri av yngru svimjarunum fáa gullnálir, og hetta er eitt tekin um góðu gongdina.

Venjingin í Klaksvík er ein liður í vnejingunum til Oyggjaleikirnar, sum nú veruliga nærkast. Hjálparvenjarin hjá landsliðnum hevur vónir um at fáa eitt gott úrslit á Rhodos í summar.

- Støðið svingar rættiliga nógv á Oyggjaleikunum, men eg meti, at vit hava avbera góðar svimjarar við í ár, so eg havi góðar vónir til leikirnar á Rhodos í summar, sigur Kristian Martin at enda.